KSS
KLAKSVÍKAR SLEIPISTØÐ

# OKKUM TØRVAR EIN LOGISTIKKLÆRLING TIL GOYMSLUNA

KSS søkir eftir logistikklærlingi til goymsluna. Á goymslu okkara hava vit lutir til smiðju og skipsarbeiði, og KSS umboðar harafturat fleiri merki innan hetta økið. Goymslan fevnir bæði um vørur til egin arbeiði, men eisini til kundar uttanífrá.

Vit vænta av tær, at tú

- hevur FHS ella aðra miðnámsútbúgving
- ert ágrýtin at arbeiða og íðin at læra
- dámar ordan og hevur tøkniligt tev
- hevur lætt við at samskifta við veitarar og kundar
- trívist í einum umhvørvi, har vit ofta hava úr at gera

Vit bjóða tær eina spennandi og viðkomandi útbúgving í eini fyritøku í vøkstri, har fáir dagar eru líka, og har tú sum lærlingur fært spennandi og avbjóðandi uppgávur og verður partur av okkara goymslutoymi.

Útbúgvingin fevnir um at tryggja bílegging, flutning og goymslu av vørum, soleiðis at lærlingurin fær ein heildarmynd av logistikki á øllum trinum í fyritøkuni.

Skúlagongdin er skipað við styttri skúlaskeiðum á Mommark Handelskostskole á Als í Danmark.

Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og S&K.

Meira fæst at vita um læruplássið við at venda sær til Esther Dahl, HR-leiðara, á telefon 232043 ella á esther@kss.fo

Umsóknir við viðkomandi skjølum skulu sendast til esther@kss.fo við frámerkinum "Umsókn goymsla". Freistin at søkja er 17. januar 2021. Tú ert eisini vælkomin at søkja, um tú verður liðug/ur á FHS ella miðnám summarið 2021.

*KSS er ein nútímans fyritøka, har alt vanligt smiðju- og viðlíkahaldsarbeiði verður gjørt fyri bæði skip og virkir alt samdøgrið. Við sínum uml. 75 starvsfólkum er KSS eitt av størstu arbeiðsplássunum í Norðoyggjum.*